Almannamálaráðið

Kopargøta 1

FO 100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 21. apríl 2026

AV j.nr.: 221.P20-0018/23

Viðgjørt: Andrea Petursdóttir
eindarleiðari, Elin Doris á Mýruni leiðari,
Janus H. í Funningsstovu, deildarleiðari

Væntaður rakstrarkostnaður fyri Sambýlið í Birtulíð og Sambýlið á Leitisvegi

Í sambandi við at Almannaráðið greiðir úr hondum verklagslóg ísv. við bygging av nýggja Sambýlinum í Miðvági, er Almannaverkið biðið um at greina rakstrarkostaðin.

Talan er um tveir nýggjar stovnar við samanlagt 19 plássum. Teir nýggju stovnarnir koma ístaðin fyri tríggjar stovnar sum í dag hava 16 pláss til samans. Harvið er talan um 3 nýggj pláss.

Stovnarnir sum eru í dag, húsast á Traðarvegi í Sandavági og Húsadalsvegi og Ovaravegi í Sørvági. Stovnurin í Sandavági húsast í landsogn, sum Almannaverkið metir kann seljast tá klárt verður at flyta virksemi til nýggju hølini. Stovnarnir í Sørvági húsast í leigumálum, sum kunnu uppsigast, tá klárt verður at flyta til Miðvágs.

Niðanfyri er meting av framtíðarrakstrinum av bæði Sambýlinum á Leitisvegi og Sambýlinum í Birtulíð. Tað eru altíð óvissur, so sum at fólk gerast verri fyri og koma at krevja hægri normering/ ella umvent. Tað skal tí vísast fyrivarni fyri, at umstøður kunnu broytast fram til, at bygningurin verður tikin í nýtslu.

Tað skal viðmerkjast, at tað, eftir ætlan í báðum nýggju sambýlunum eru íroknaðar útreiðslur, sum ikki hevur verið siðvenja í Almannaverkinum. Her verður serliga hugsað um køksfólk, húsavørð og varaleiðara. Hettar er nærri lýst niðanfyri.

Umskipan av virksemi

Í samband við, at nýggi stovnurin letur upp, steðgar virksemi í Ovaravegi 27 í Sørvági. Talan er um samanlagt 5 búpláss t.v.s. 4 sambýlispláss og eitt pláss skipað sum serfyriskipan.

Á Leitisvegi eru 7 íbúðir. Tær tvær sum eru til yvurs, verða í fyrstu atløgu brúktar til felagsøki og starvsfólkaøkið, ímeðan arbeitt verður við at umvæla verkstaðsbygningin.

Fyrsta flytingin umfatar tí, at sambýlið á Ovaravegi og serfyriskipanin flyta til íbúðirnar á Leitisvegi.

Tá verkstaðsbygningurin og nýbyggingin er gjøgnumførd, og klár at taka í nýtslu, skulu fólk úr sambýlunum á Traðarvegi og Húsadalsvegi flyta til nýbygda Sambýlið í Birtulíð.

1. **Rakstur fyri sambýlið í Sørvági**

Í Tabel 1 vísir, hvør fígging fylgir við til Leitisveg. Talan er um Sambýlið í Sørvági og serskipanina.

Tabel 1: Rakstur sum flytur við til Leitisveg – Sambýlið í Sørvági og Serskipan

Sambýlið á Leitisvegi	**Pláss**	**Kostnaður**
Sambýlið í Sørvági	4	2.514.214
Serskipan	1	3.251.000
Tilsamans		**5.765.214**

Sum tað sæst í Tabel 1, er rakstrarkostnaðurin fyri sambýlið í dag á 5,8 mió. kr. Hettar gevur ein eindarkostnað á 1,2 mió. kr. pr. pláss pr. ár.

Væntanin er, at rakstrarkostnaðurin fyri Sambýlið í Sørvági og serskipan verður tann sami, eftir flyting til Leitisveg. Tá alt virksemi verður flutt nýggja Sambýlið, verður støðan ein onnur, sum lýst í tabel 3.

2. **Rakstur fyri sambýlið á Húsadalsvegi og Traðarvegi**

Tabel 2: Rakstur sum flytur við til Sambýlið í Birtulíð – Sambýlið á Húsadalsvegi og Traðarvegi

Sambýlið Birtulíð	**Pláss**	**Kostnaður**
Sambýlið á Húsadalsvegi	5	4.707.105
Sambýlið á Traðarvegi	6	6.906.934
Tilsamans		**11.614.039**

Sum tað sæst í Tabel 2, er rakstrarkostnaðurin fyri sambýlini í dag á 11,6 mió. kr. Hettar gevur ein eindarkostnað á 1,1 mió. kr. pr. pláss pr. ár.

Niðanfyri eru væntaðu rakstrarútreiðslurnar til nýggju sambýlini.

Tabel 3: Mettar útreiðslur til Sambýlið í Birtulíð og Sambýlið á Leitisvegi

Mett útreiðsla Sambýlið í Birtulíð og Sambýlið á Leitisvegi	**Tímar pr. ár**	**Ársverk**	**Kostnaður pr. ársverk kr.**	**Kostnaður pr. ár kr.**
Lønir tímar og tímar pr. ár námsfrøðingar[1]	45.032	21,65	750.000	16.237.500
Varaleiðari		0,5	375.000	375.000
Lønir til vaskifólk 40 timar viku		1	450.000	450.000
Løn køksfólk 20 tímar viku		0,5	450.000	225.000
Húsavørður		0,5	325.000	325.000
Rakstur og fyrisiting				800.000
Tilsamans				**18.412.500**
Frátrekt kostnað sambært tabel 1 og 2				17.379.253
Mettar netto útreiðslur				**1.033.247**

Viðmerking: Í hesum uppskotinum verður normeringin lækkað til starvsfólk vegna stórrakstrarfyrimunir. Tað er talan um færri náttarvaktir, kvøldvaktir og dagvaktir.

Við í kostnaðinum pr. ársverk er, serstøk frívika, feriuavloysarar og 4% sjúkrafrávera

Afturat kostnaðinum í tabel 3, verður ein **eingangsútreiðsla á 660.000 kr. til etablering**.

Normering til starvsfólk

Sambýlini fara at rúma tilsamans 19 fólk. Sambýlið á Birtulíð verður skipað í tveimum eindum.

Í Birtulíð verður eina eindin til borgarar, sum hava stóran tørv og krevja nógva starvsfólkaorku. Í hinari eindini eru fólkini meira sjálvbjargin, tó hava tey brúk fyri dagligum stuðli.

Í Leitisvegi verður ein eind til fólk sum hava miðal til stóran tørv á dagligum stuðli og vegleiðing.

Í sambýlunum eru í dag 2 serskipanir. Hesar serskipanir krevja 1-1 í dag- og kvøldtímum, men deila náttarvakt. Hesar mugu skipast í nýggju sambýlunum í Birtulíð og á Leitisvegi.

Varaleiðari

Eftir ætlan, skal nýggi stovnurin rekast við einum leiðara og einum varaleiðara. Ætlanin er at royna hendan nýggja leistin fyri at tryggja fakliga partin av virkseminum. Almannaverkið metir, at tað er neyðugt, av tí at talan er um málbólkar við umfatandi avbjóðingum og stórum tørvi. Aftrat tí er ætlanin at Skáin verður dagtilboð við tilknýti til verkstaðsbygningin, og eisini fevnt av leiðsluni á staðnum.

Vaskifólk

Vaskifólk vera sett at vaska regluliga í gerandisdegnum. Tað verður mett meira fíggjarliga skynsamt enn at nýta veitarar til arbeiðið.

Køksfólk

Ynskiligt er, at eitt kostrøktarstarvsfólk verður sett hálva tíð. Kostur hevur týdning fyri heilsu, trivnað og fakliga dygd í arbeiðinum. Fyri borgarar við serligum tørvi hevur rættur kostur beinleiðis ávirkan á kropsliga og sálarligu heilsuna.

Kostrøktarstarvsfólk tryggja, at maturin er samansettur eftir almennu kostráðunum og tørvinum hjá tí einstaka samstundis, sum innkeypið verður skipað fíggjarliga skynsamt.

Húsavørður

Ynskiligt er, at tilskila rakstur til ein námsfrøðiligan húsavørð frá fyrsta degi, fyri at tryggja vælvirkandi umstøður. Umframt at taka sær av viðlíkahaldsuppgávum, so er ætlanin, at viðkomandi eisini hevur til uppgávu, at taka búfólkini við í hetta arbeiðið, í tann mun, tað letur seg gera. Áður hevur ikki verið biðið um húsavørð. Men tað er ein átrokandi tørvur, og tað er dýrt at keypa seg til hesa tænastu aðrastaðni.

Rakstur og fyrisiting

Rakstur til stovnin fevnir um bæði útreiðslur til vanligar vørur, rakstur av starvsfólkum og rakstur av leiðslu og felagsfunktiónum.

Etablering

Hettar er ein meting, sum tekur støði í kostnaðinum fyri etableringsútreiðalunum í Reynstúni. Talan er um innkeyp av, í høvuðsheitum leysum innbúgvi, skrivstovuinnbúgv, búnýti o.s.fr.

Skáin

Í hesum skrivi er tað tikið útgangsstøðið í rakstri uttan Skáan - dagtilboðið. Skáin skal eftir ætlan rúmast í verkstaðsbygninginum.

Skáin veitir tænastu til áleið 15 borgarar um vikuna og kostar 1.234.694 kr. árliga.

Virksemi í Skáanum fer at hava gagn av góðum kørmum, har hentleikar o.a. kann deilast við virksemi annars á staðnum. Almannaverkið væntar, at tað er í størri mun talan eina høga góðsku til sama rakstrarkostnað.

Kostnaður pr. borgara áðrenn og aftaná flyting til Miðvágs

Kostnaðurin pr. pláss pr. ár á teimum trimum stovnunum, sum eftir ætlan skulu leggjast niður, er í dag 1,1 mió. kr.

Nýggi eindarkostnaðurin er á 897 tkr. pr. pláss pr. ár. (Fyri at tryggja samanbering við núverandi eindarkostnað, er hettar sbrt. lønarútreiðslum, rakstur og fyrisiting sum víst í tabel 3.) Tað skal eisini havast í huga, at hóast kostnaðurin pr. pláss lækkar, so fer tænastustøðið at hækka munandi. Her er talan um góðar umstøður til borgaran við egnari nútímans íbúð við vesi og egnari inngongd. Harumframt vera umstøðurnar eisini skipaðar betur, við fakfólkið innan reingerð, matgerð og húsavørð.

Eindarkostnaðurin er uttan etablering, síðan hettar er ein eingangsútreiðsla. Hesin eindarkostnaðurin fevnir eisini um eina betri tænastu og betri karmar fyri borgaran sum skal búgva á staðnum, nærri lýst at enda í hesum skrivið.

Tórshavn tann 21. Apríl 2026

_____

Asta Marjunardóttir, veitingar- og tænastustjóri

Almannaverkið